# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Torbjørn Viderø 50 ár



Í morgin, sunnudagin 19. juni, verður Torbjørn Viderø 50 ár. Hann hevur seinastu níggju árini verið yvirlækni á Landssjúkrahúsinum.

Foreldrini hjá Torbirni eru Trina og Kristian Osvald Viderø. Hon var ættað úr Hvalvík, og hann var úr Skálavík. Torbjørn eigur eina systir, sum eitur Margretha. Hon býr í Havnini.

Kristian Osvald, sum doyði 8. apríl í 1991, var prestur í Hvalvík, Havnini, á Viðareiði og í Hvalba. Tí minnist Torbjørn aftur á barna og ungdómsárini í eitt nú Ónagerði og í Leirum. Hann greiðir nágreiniliga frá hugnaligum og spennandi barndómsminnum, og í Hvalvík er hann ofta, tí har eigur hann jørð, bát og neyst.

Eftir realskúlan á Tvøroyri arbeiddi Torbjørn hjá mammubeiggjanum, Thomasi Ørv, sum hevði fleiri umboð. Eitt nú seldi hann Saab bilar, og Torbjørn hevur altíð hildið seg til tað merkið.

Í 1976 var Torbjørn í fyrsta HF flokkinum, sum leyk prógv í Hoydølum. Ungdómsárini var hann eitt nú upptikin av tónleiki. Hann spældi við í Kræklingum, har hann var guitaristur og sangari, og tað vóru hann og orkesturfelagarnir, sum gjørdu Svartaravn kendan. Eisini var og er Torbjørn sera áhugaður í fótbólti. Hann spældi við Royn, og studentaárini hugnaði hann sær saman við øðrum føroyingum á grønu vallunum í Danmark.

Torbjørn gekk á støðisútbúgvingini á Fróðskaparsetrinum, áðrenn hann fór til Odense at lesa til lækna. Miðskeiðis í áttati árunum leyk hann prógv, og so fór hann at útbúgva seg til skurðlækna. Hann var nógv í Svøríki, har hann arbeiddi í Karlshamn og Eskilstuna, og áðrenn hann flutti til Føroya, arbeiddi hann á Slagelse Central Sygehus. Síðani í 1996 hevur Torbjørn verið á Landssjúkrahúsinum, har hann serliga hevur tikið sær av skurðviðgerðum í maganum og tarmunum.

Torbjørn eigur ikki part í at vera sjálvhátíðarligur. Hann er sera umgeingiligur og positivur, og hann spjaðir hugna og álit um seg – bæði í arbeiðnum og aðra staðni.

Torbjørn er innløgumaður. Honum dámar væl at skjóta fugl, at vera í grind og á floti, at velta epli og fáast við seyð. Hann er fastur fjalmaður hjá svágrinum inni á Regni á Toftum, og hann er góður flettari.

Torbjørn er giftur við Dagmar, sum er læknaskrivari, og sum er ættað innan av Regni á Toftum. Tey búgva á Norðasta horni, og tey eiga tveir synir – Kristian og Tummas Eli. Torbjørn eigur eisini dóttrina Katrin.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Hans Clementsen,** vanliga nevndur Hans í Andarisa, ættaður av Sandi, búsitandi á Seyðisfirði, andaðist 13. juni, 85 ára gamal. Jarðarferðin verður úr kirkjuni á Seyðisfirði leygardagin 18. juni.

**Amanda Lamhauge,** Lamba, andaðist á Eysturoyar røktar- og ellisheimi 15. juni, 86 ára gomul. Kistan fer av røktarheiminum í Glyvra kirkju í kvøld klokkan 18:00. Jarðarferðin verður úr Glyvra kirkju mánadagin 20. juni klokkan 14:00.

**Jóhan Petur Hentze,** ættaður úr Froðba, búsitandi í Sønderborg, andaðist mánadagin 84 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Kristen Center Damgade 94, leygardagin klokkan 10:30.

*Kelda: Útvarp Føroya*

Móttøka
40 ára starvsdagur



Sosialurin 341800

Í sambandi við 40 ára starvsdagin hjá Tórbjørn Petersen, verður móttøka á Smyrilsvegi 8 hjá P/F Maria Poulsen

**mikudagin 22. juni frá kl. 15-17**

Tað hevði glett okkum at sæð vinir, kenningar, starvsfelagar og viðskiftafólk

**pf Maria Poulsen & Co.**

um...
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
...er lisin
-so ert tú við!

†

Okkara elskaða mamma, vermamma, omma og langomma

**Amanda Johanna Lamhauge,**
Lamba

andaðist á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi mikudagin 15. juni, 86 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Glyvra kirkju mánadagin 20. juni kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*

**Piddi, Ásmund, Hans Jacob, Annemia, Ingvard og Hanna**

Tey, ið ynskja at minnast Amandu, kunnu lata eina peningagávu til Eysturoyar Røktar- og Ellisheim, konta í peningastovnunum.

Sosialurin
Sosialurin
i